gult6 cyan6 magenta6 svart6



# Hevur Fólkatingið í rygginum



*Tað er við meginpartinum av Fólkatinginum í rygginum, at Poul Nyrup Rasmussen førir hørðu linjuna móti Føroyum*

**Fólkatingið samtykti í gjár við stórum meiriluta at stuðla Nyrup í linjuni mótvegis Føroyum**

SJÁLVSTÝRIS-SAMTYKTIN
*John Johannessen*

Tað er við breiðum meiriluta av Fólkatinginum í rygginum, at Poul Nyrup Rasmussen førir hørðu linjuna móti landsstýrinum.

Fólkatingið samtykti í gjár við stórum meiriluta at taka undir við linjuni hjá stjórnini.

Fólkatingið mælir harumframt stjórnini til at gera eina avtalu um blokkstuðulin fyri næsta ár og tekur undir við, at stjórnin samráðist við landsstýrið um yvirtøkur sambært heimastýrislógini.

## Vilja ikki tveita Føroyar út



*Óli Breckmann og Jóannes Eidesgaard vóru millum teirra, sum á Fólkatingi harðliga mótmæltu uppskotinum frá Frank Dahlgaard um at tveita Føroyar úr ríkisfelagsskapinum*
*Mynd: Jens Kristan Vang*

**Uppskotið frá uttanflokkamanninum, Frank Dahlgaard, um at tveita Føroyar úr ríkisfelagsskapinum, fekk onga undirtøku á Fólkatingi**

RÍKIS-FELAGSSKAPUR
*John Johannessen*

Uttanflokkamaðurin, Frank Dahlgaard, stóð ógvuliga einsamallur, tá uppskot hansara, um at tveita Føroyar úr ríkisfelagsskapinum var til fyrstu viðgerðar í Fólkatinginum mikudagin.

Allir flokkar søgdu seg meta uppskotið sum beinleiðis óvirðiligt og óseriøst. Eisini føroysku fólkatingsumboðini, Óli Breckmann og Jóannes Eidesgaard tóku orðið og vístu á, hvussu óvirðiligt uppskotið var.

Eftir stutta viðgerð varð uppskotið beint í 21-manna nevndina, ið tekur sær av málum viðvíkjandi ríkisrættarligu støðu Føroya.

## Eingin sjálvsavgerðarrættur

SJÁLVSTÝRI
*John Johannessen*

Vit skrivaðu í gjár, at Fólkataingið hevði samtykt, at Føroya fólk hevur sjálvsavgerðarrætt.

Hetta er ikki heilt beint. Tí Fólkatingið staðfesti, at tað er føroyska fólkið, ið avgerð sambandið við Danmark, bæði tá tað snýr seg um at fáa fullveldi, og tá tað snýr seg um, hvørt vit ynskja at víðka verandi skipan.

Hetta er ikki tað sama, sum at staðfesta, at Føroyar eru ein tjóð við ómissandi sjálvsavgerðarrætti.



*Blokkurin skal burtur eftir fýra árum, um ein komandi samgonga vil yvirtaka eftir sjálvstýrissamtyktini fram til 2012. Men um ein onnur samgonga vil yvirtaka, men ikki eftir sjálvstýrissamtyktini, er møguleiki fyri, at blokkurin heldur fram. Hetta er tað, ið kann tulkast úr nýggjastu útmeldingini frá Nyrup um Føroyar*
*Mynd: Jens K. Vang*

# Nyrup ger blokkin til valstríð

**Nýrup hóttir við fýra ára skiftistíð, um sjálvstýrissamtyktin stendur við komandi árini. Kortini vil hann gera avtalu fyri blokkin í 2002 og so meta um støðuna næsta ár. Landsstýrið tulkar hetta sum valstríð fyri føroysku andstøðuna**

SJÁLVSTÝRIS-SAMTYKTIN
*John Johannessen*

– Stjórnin hevur framvegis ta prinsipiellu uppfatan, at tað er samanhangur millum ábyrgd og búskap. Sostatt er støða stjórnarinnar framvegis, at ríkisstuðulin til Føroya má minka burtur eftir fýra árum.

Soleiðis segði danski forsætisráðharrin, Poul Nyrup Rasmussen, í røðu síni í Fólkatinginum undir spurnarorðaskiftinum um Føroyar mikudagin.

Hendan útmelding sigur greitt, at stjórnin uppfatar sjálvstýrissamtyktina sum eina fullveldisætlan, og tí stendur fast við, at Føroyar fáa eina búskaparliga skiftistíð á fýra ár.

### Ósamsvar

Tá tíðindamenn hjá Útvarp Føroya á Christiansborg eftir orðaskiftið beinleiðis spurdu danska forsætisráðharran, um avtalan um blokkin í 2002 skuldi fatast sum fyrsta árið í skiftistíðini, svaraði hann, at tað vildi hann ikki taka støðu til beint nú.

– Lat okkum nú fara í gongd við tað praktiska. Lat okkum loysa tær báðar samráðingaruppgávurnar, vit hava í ár um blokkstuðulin og um yvirtøku av málsøkjum innan fyri heimastýrislógina. Og lat okkum so síggja, hvussu næsta stigið sær út næsta ár, segði Poul Nyrup Rasmussen í sama sambandi.

Hetta kundi bent á, at danski forsætisráðarrin bíðar eftir einum løgtingsvalið í Føroyum. Og at fýra ára skiftistíðin kemur í gildi, um komandi samgonga stendur við sjálvstýrissamtyktina. Men at alt er í fínasta lagi, um ein komandi føroysk samgonga tekur frástøðu frá sjálvstýrissamtyktini.

Tað vil siga, at blokkurin skal burtur eftir fýra árum, um ein komandi samgonga vil yvirtaka eftir sjálvstýrissamtyktini fram til 2012. Men um ein onnur samgonga vil yvirtaka, men ikki eftir sjálvstýrissamtyktini, er møguleiki fyri, at blokkurin heldur fram. Hetta kann tykjast eitt sindur ósamsvarandi.

### Ódemokratiskur

Høgni Hoydal, varaløgmaður, sigur í tíðindaskrivi, at hetta er enn eitt dømi um, at eingin virðing er fyri fólkaræðinum í Føroyum. At lagt verður uppí innanhýsisi føroyskan politikk, og at politisku meirilutin í Føroyum ikki verður virdur. Somuleiðis heldur Høgni Hoydal, at Nyrup beinleiðis stuðlar føroysku andstøðuni í einum valstríði til komandi løgtingsval.

Løgmaður er kortini ikki so bersøgin. Hann heldur ikki, at Nyrup meinar hetta um blokkin so álvarsliga, sum hann letur til.

– Tað kann ikki bera til, at Poul Nyrup Rasmussenn kutar blokkin, bert vit tosa um at yvirtaka, sigur løgmaður, sum vónar at fáa greiðu á hesum, tá hann sleppur at samráðast við danska forsætisráðharran innan ikki ov langa tíð.

### Roynir at vera greiður

Hinvegin ber eisini til at skilja danska forsætisráðharran. Hann skal vera greiður móti sínum donsku veljarum, ið hava krav uppá at vita, hvørja støðu stjórnin hevur til ta einu milliardina, hon sendir til Føroya hvørt ár.

Somuleiðis hava føroyingar krav uppá at vita, hvørja støðu stjórnin hevur til eitt uppskot, sum viðvíkur okkara egnu framtíð.

Hetta ger sjálvsagt, at Poul Nyrup Rasmussen óbeinleiðis kemur at blanda seg í eitt føroyskt valstríð. Fullveldi hevur verið ovast á breddanum seinastu trú árini, og verður tað eisini ovast á breddanum til komandi val; sama hvat Nyrup sigur og ger.

Um Nyrup einki segði um føroysku sjálvstýrissamtyktina, er ikki vist, at føroyingar høvdu verið serliga væl nøgdir.

gult7 cyan7 magenta7 svart7



Høgni Hoydal um orðaskiftið á Fólkatingi:

# Ongin virðing fyri fólkaræðinum

**Ein stórur meiriluti í danska fólkatinginum stuðlar framvegis donsku stjórnini í royndunum at forða føroyskum fullveldi. Hetta er almenna viðmerkingin frá Høgna Hoydal, landsstýrismanni í sjálvstýrismálum, eftir orðaskiftið á Fólkatingið mikudagin**

SJÁLVSTÝRIS-SAMTYKTIN
*John Johannessen*



Ein stórur meiriluti í danska fólkatinginum stuðlar framvegis donsku stjórnini í royndunum at forða føroyskum fullveldi.

Ein meiriluti á Føroya Løgtingi hevur staðfest, at føroyingar eru tjóð við sjálvsavgerðarrætti, og at Føroyar skulu taka fullveldi: Heimastýrislógin skal avriggast og donsku peningaveitingarnar skulu fella burtur.

Kortini verður samtykt Løgtingsins ikki vird:

– Danska fólkatingið viðger framvegis ikki føroyingar sum tjóð við sjálvsavgerðarrætti, men tosar um "den færøske befolkning".

– Danska fólkatingið vil ikki gera avtalur um at leggja burturminkingina av heildarveitingina í fastari legu.

– Danska fólkatingið mælir ístaðin til at samráðast um eina "sjálvstýrisskipan innanfyri ríkisfelagsskapin" ella at gera ábøtur á verandi heimastýrislóg, soleiðis sum ynskini eru frá andstøðuflokkunum í Føroyum.

– Og danska stjórnin og danska fólkatingið leggur seg framvegis beinleiðis uppí innanhýsis føroysk viðurskifti, hóast sagt verður at "den færøske befolkning afgør Færøernes tilknytning til Danmark".

Søgan endurtekur seg: Hetta er enn eitt dømi um, at ongin virðing er fyri fólkaræðinum í Føroyum, at lagt verður uppí innanhýsis føroyskan politikk, og at politiski meirilutin í Føroyum ikki verður virdur.

Roynt verður ístaðin framvegis við politiskum og búskaparligum trýsti, at fáa løgtingsmeirilutan og føroyska veljararan at sleppa sínum rættindum og fullveldisvilja.

Tí er alneyðugt, at allar royndir at gera nýggjar heimastýris- ella sjálvstýrislógir verða afturvístar. Tær kunnu binda okkum enn fastari og lima okkum endaliga inn í danska ríkið.

Og tí er alneyðugt, at hildið verður fast við samtykt Løgtingsins, so at vit skipa okkara egnu skiftistíð, gera okkum leys av fíggjarligum og umsitingarligum bindingum og staðfesta føroyska fullveldið sjálv.


Sosialurin Sosialurin
i
Sosialurin Sosialurin

BROYTT FERÐAÆTLAN FYRI SUMMARIÐ 2001



FERÐAÆTLAN SUMMARIÐ 2001
Tyrlutænastan

| SUNNUDAG | Fráferð |
|---|---|
| Vágar | 12.30 |
| Gásadal | 12.36 |
| Mykines | 12.42 |
| Vágar | 12.53 |
| | |
| Vágar | 13.00 |
| Koltur | 13.07 |
| Tórshavn | 13.12 |
| Skúvoy | 13.27 |
| Dímun | 13.32 |
| Skúvoy | 13.37 |
| Tórshavn | 13.52 |
| Klaksvík | 14.04 |
| | |
| Klaksvík | 14.35 |
| Svínoy | 14.47 |
| Kirkja | 14.51 |
| Hattarvík | 14.54 |
| Klaksvík | 15.12 |
| Tórshavn | 15.24 |
| Koltur | 15.29 |
| Vágar | 15.36 |

| MIKUDAG | Fráferð |
|---|---|
| Vágar | 09.45 |
| Gásadal | 09.51 |
| Mykines | 09.57 |
| Vágar | 10.08 |
| | |
| Vágar | 11.10 |
| Koltur | 11.17 |
| Tórshavn | 11.22 |
| Skúvoy | 11.37 |
| Dímun | 11.42 |
| Froðba | 11.51 |
| | |
| Froðba | 12.35 |
| Dímun | 12.44 |
| Skúvoy | 12.49 |
| Tórshavn | 13.04 |
| Klaksvík | 13.16 |
| Svínoy | 13.28 |
| Kirkja | 13.32 |
| Hattarvík | 13.35 |
| Klaksvík | 13.53 |
| | |
| Klaksvík | 14.40 |
| Tórshavn | 14.52 |
| Koltur | 14.57 |
| Vágar | 15.04 |

| FRÍGGJADAG | Fráferð |
|---|---|
| Vágar | 09.45 |
| Gásadal | 09.51 |
| Mykines | 09.57 |
| Vágar | 10.08 |
| | |
| Vágar | 11.10 |
| Koltur | 11.17 |
| Tórshavn | 11.22 |
| Klaksvík | 11.34 |
| Svínoy | 11.46 |
| Kirkja | 11.50 |
| Hattarvík | 11.53 |
| Klaksvík | 12.11 |
| | |
| Klaksvík | 13.00 |
| Tórshavn | 13.12 |
| Skúvoy | 13.27 |
| Dímun | 13.32 |
| Froðba | 13.41 |
| | |
| Froðba | 14.15 |
| Dímun | 14.24 |
| Skúvoy | 14.29 |
| Tórshavn | 14.44 |
| Koltur | 14.49 |
| Vágar | 14.56 |
| | |
| Vágar | 15.30 |
| Gásadal | 15.36 |
| Mykines | 15.42 |
| Vágar | 15.53 |

| [illegible] | Mykines | Gásadal | Vágar | Koltur | Tórshavn | Skúvoy | Dímun | Froðba | Klaksvík | Svínoy | Hattarvík | Kirkja |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Mykines | | 85,- | 145,- | 290,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- |
| Gásadal | 85,- | | 145,- | 290,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- |
| Vágar | 145,- | 145,- | | 130,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- |
| Koltur | 290,- | 290,- | 130,- | | 85,- | 215,- | 215,- | 290,- | 290,- | 290,- | 290,- | 290,- |
| Tórshavn | 215,- | 215,- | 215,- | 85,- | | 130,- | 130,- | 215,- | 215,- | 215,- | 215,- | 215,- |
| Skúvoy | 335,- | 335,- | 335,- | 215,- | 130,- | | 85,- | 85,- | 335,- | 335,- | 335,- | 335,- |
| Dímun | 335,- | 335,- | 335,- | 215,- | 130,- | 85,- | | 85,- | 335,- | 335,- | 335,- | 335,- |
| Froðba | 360,- | 360,- | 360,- | 290,- | 215,- | 85,- | 85,- | | 360,- | 360,- | 360,- | 360,- |
| Klaksvík | 360,- | 360,- | 360,- | 290,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | | 110,- | 110,- | 110,- |
| Svínoy | 360,- | 360,- | 360,- | 290,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | 110,- | | 110,- | 110,- |
| Hattarvík | 360,- | 360,- | 360,- | 290,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | 110,- | 110,- | | 85,- |
| Kirkja | 360,- | 360,- | 360,- | 290,- | 215,- | 335,- | 335,- | 360,- | 110,- | 110,- | 85,- | |

BÍLEGGING
Tel 34 10 10 - Fax 34 10 01
Mánadag - Fríggjadag
Kl 08.00 - 16.00
Sunnudag
Kl. 12.00 - 16.00

BØRN
0 - 6 ár: Ókeypis
7 - 13 ár: 50%

VIÐFØRI
Í mest lagi 20 kg.

- galdandi 1. mai - 1. oktober 2001

ATLANTIC AIRWAYS
Tel 34 10 10 - Fax 34 10 01
www.atlantic.fo